# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tórshavnar Kommuna má fáa betri barnaansing!

Flestu okkara vænta, at ein stór kommuna kann bjóða eitt hægri tænastustøði enn smærri kommunur. Soleiðis er helst á fleiri økjum, men Tórshavnar Kommuna kann ikki sigast at vera annað enn eftirbátur á barnaansingarøkinum.

Aðrar kommunur í Føroyum við betýðiligt minni av umsitingarligari orku enn Tórshavnar Kommuna kunnu bjóða borgarum sínum parttíðar barnaansing. Hetta megnar Tórshavnar Kommuna av onkrari orsøk ikki.

Hetta er ringt at skilja, tí eftirspurningurin eftir hálvtíðaransing er stórur. Samfelagið er soleiðis innrættað í dag, at tey, ið ynskja at hava børn síni heima, illa fáa gjørt tað, tí at øll onnur børn eru á stovni. Fyri slík hevði hálvtíðaransing verið eitt fínt tilboð. Eisini vildi hálvtíðaransing verið eitt fínt tilboð hjá fólki, sum arbeiða skeivar tíðir á døgninum.

Kobla vit so omanfyristandandi argument saman við tí faktum, at tað er bíðilisti til barnaansing í Tórshavnar Kommunu, so er uppaftur meiri óskilligt, at kommunan ikki bjóðar parttíðar barnaansing. Nógv høvdu tikið av hesum tilboði, og tað hevði frígjørt nógv pláss og stytt um bíðilistarnar.

Barnaansing er ein tænasta, sum skal tillagast brúkaran. Viðhvørt tykist sum um, at brúkarin noyðist at tillaga seg tænastuna, hvat barnaansing viðvíkur. Væntandi hálvtíðartilboðið í Tórshavnar Kommunu er eitt dømi um hetta.

Eitt annað dømi er, at barnagarðar stongja í ferium og at barnagarðar steingja vegna fundarvirksemi. Hetta er ein óskikkur, sum ikki eigur at koma fyri. Hugsið tykkum, um Smyril bleiv lagdur í 14 dagar vegna feriu, ella lá ein hósdag, tí manningin skuldi á fund. Hetta hevði sjálvsagt ikki borið til, og ilt er at síggja, hví barnaansing skuldi verið øðrvísi.

Bara tað, at tað eru bíðilistar til barnaansing í kommunum, ber boð um vánaliga planlegging, tí tað kann hóast alt ikki koma óvart á kommununa, at fólk fáa børn. Hugsið tykkum, um tað var bíðilisti til fyrsta flokk í fólkaskúlanum – púra óhugsandi. Hví skuldi barnaansing verið øðrvísi?

Vónandi tekur størsta kommuna í landinum sær um reiggj og gerst ein fyrimynd á barnaansingarøkinum, heldur enn at vera eftirbátur sum nú. Byrjað kundi verið við at bjóðað hálvtíðaransing og harvið stytt um bíðilistarnir.

**Sosialurin**

## Viðmerkingar til Óla Mikkelsen, fyrrverandi yvirlækna á Landssjúkrahúsinum



**JÓGVAN VIÐ KELDU**
norðoyatingmaður

**Her er talan um makt, um setralismu. Hvussu stovnurin virkar tykist at koma í aðru røð. - Tað er ikki peningur, ið tørvur er á.**

Tað er nú eitt sindur síðani, at eitt prát var millum fyrrverandi yvirlækna á Landssjúkrahúsinum, Óla Mikkelsen og ein blaðmann Dimmalættingar um føroyska sjúkrahúsverkið har læknin mælti til at “stongja bæði tey smærru sjúkrahúsini og brúka alla orkuna uppá Landssjúkrahúsið”.

Tað hevur undrað meg, at eingin – leikur ella lærdur – hevur tikið til máls ímóti hesum løgnu og afturvendandi útsagnum.

Í Føroyum búgva, sum Óli Mikkelsen sigur, 48 túsund fólk. Tí heldur hann, at her eigur bert at vera eitt sjúkrahús. Hann grundgevur hetta við, at í Danmark skulu 250túsund fólk til fyri at reka eitt sjúkrahús.

Støðan í dag í londunum uttanum okkum er, at í Danmark eru 82 sjúkrahús til 5 mió. fólk, sostatt um 60 túsund fólk til hvørt sjúkrahús, í Svøríki 100 sjúkrahús til 8 mió. íbúgvar, meðan tað í Finnlandi eru 350 sjúkrahús til 5 mió.

Spurningur er sostatt ikki um eitt sjúkrahús, men ein sjúkrahúsbygna sum virkar.

Her er ikki bara talan um hvussu nógv, hvussu stórt, talan er um at fáa tað at virka yvirhøvur. Tað ber altíð til at falda, dividera o.s.fr. men tað virkar framvegis ikki.

**Er tað tað, sum er “hol í høvdið”**

Niðurstøðan hjá hesum lækna er, sum í mong ár stríddist á Landssjúkrahúsinum, at so er “hol í høvdið at hava trý sjúkrahús” í okkara landi. Er tað nú tað?

Óli Mikkelsen gloymir, ella vil blindað fólk við, at vit framvegis bert eru 48 túsund íbúgvar, og at vit við hesum veruleika skulu leggja okkara bygna. Spurningurin er heldur ikki, hvussu mong eru til hvørt sjúkrahús í størru londunum í Norðurlondum, ella í USA, har helst skal 1 mió. fólk til hvørt sjúkrahús, hóast tað nú ikki eru 250.000 íbúgvar til hvørt sjúkrahús í Danmark.

Tí er umráðandi, at handfarið verður eftir okkara umstøðum, og ikki einum bygna, sum vit ongan møguleika hava at samanlíkna okkum við.

Tí havi eg hug einaferð enn at seta spurningin, er tað ikki júst henda skeivmetanin, sum hesin fyrrverandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinm tekur upp, og sum altíð hevur verið framhildin, hevur gjørt, at Landssjúkrahúsið yvirorðnað hevur havt so ovurhonds stórar trupulleikar at dragast við, so at sjálvt Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður og læknar á stovninum nú siga, at tað snýr seg ikki um pengar, men um heilt onnur viðurskifti. Ja kanska ein álvarsom skeivmeting.

Landsstýrismaðurin fer í næstum at leggja álit um sjúkrahúsbygnaðin fyri løgtingið til aðalorðaskifti. Eg kann siga landsstýrismanninum, at um linjan hjá Óla Mikkelsen verður fylgd, hevur samfelagið ein stóran trupulleika í framtíðini. Vit eru bert 48.000 íbúgvarar og hvørki fimm, átta ella ella trýhundrað mió. íbúgvar.

Í øll hesi seinastu 30 árini hevur yvirorðnaði “statturin” á hesum stovni ikki fingið tað við. Tí hevur stovnurin eisini fingið størstu játtanarhækkingar tó uttan at virka yvirhøvur.

**Følsk trygd**

Man eisini orsøkin til, at Óli Mikkelsen so hemningsleyst leggur eftir smærru sjúkrahúsunum vera, at hann vil flyta fokusið frá teimum ævigt verandi trupulleikunum á Landssjúkrahúsinum, sum eisini hava verið hesa seinastu tíðina, og framvegis eru tað, og soleiðis sendir alt tað føroyska samfelagið út í endaleysan ótryggleika. – Tí Landssjúkrahúsið er helst ein følsk trygd meiri enn í einum føri.

Rætt er, sum Óli Mikkelsen sigur, at tað eru so nógvar sergreinir, alt er so specialiserað. Latið okkum, sum gjørt verður aðrastaðni, leggja ávísar sergreinir á smærru sjúkrahúsini. Trýr hann veruliga, at tá smærru sjúkrahúsini er stongd, at Landssjúkrahúsið er ført fyri at taka allar hesar 30-40 sergreinir og tað fer at virkað.

– Her er ikki júst eymýkt, sum eyðkennir hesa statt.

Áðrenn eg gevist hesaferð, eg verið noyddur at skriva eina grein afturat, fari eg bert at nevna, nú fráfarni yvirlæknin stuðlar seg til fráfarna ríkisumboðsmannin Niels Bendtsen, sum orsakað av, at hann var ósamdur við sjúkrahússtýrini, gjørdist so “fornermaður”, at hann ikki møtti á sjúkrahússtýrisfundum, men sendi skrivstovustjóran fyri seg. – Eg sat tá sjálvur sum formaður í stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Her er talan um makt, um sentralismu. Hvussu stovnurin virkar, tykist at koma í aðru røð. - Tað er ikki peningur ið er tørvurin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.